# Hiddink gevst

Niðurlendski fótbóltsvenjarin Guus Hiddink hevur havt eina hepna hond, síðani hann tók við sum venjari í Chelsea fyrr í ár. Hiddink varð settur at røkja starvið fram til summarsteðgin, og nú ger leiðslan í Chelsea greitt, at Hiddink heldur ikki fram, hóast úrslitini hava verið góð. Guus Hiddink er venjari hjá russiska landsliðnum, og har heldur hann fram sum venjari.



# Vilja selja Enke til Bayern

Týska stórfelagið FC Bayern leitar eftir nýggjum málmanni, tí Michael Rensing hevur ikki staðið seg serliga væl í ár. Danski landsliðsmálmaðurin Thomas Sørensen hevur verið nevndur sum eitt boð, men nú er Hannover til reiðar at selja Robert Enke til Bayern. - Um Bayern setir seg í samband við okkum, eru vit til reiðar at taka samráðingar upp, sigur ítróttarstjórin í Hannover, Martin Kind, við Bild.



*Verjan hjá Stjørnuni hevur ofta verið bjargingin hjá liðnum. Ikki óvæntað løgdu tær dent á at halda Adinu Petrea burtur frá møguleikum, men tað munaði lítið í samlaða roknistykkinum*

leggjast afturat, at Tjaldur so ruddiliga hevur víst tær dygdirnar, sum krevjast fyri at vinna eitt meistaraheit.

Gjøgnum kappingina hava tær prógvað, at tær vóru førar fyri at vinna dystirnar, tá mest stóð á. Eisini hóast heimatapið móti Neistanum var eitt sindur hálv-kritiskt.

Stóra kynstrið í ítrótti er at prógva tínar dygdir, júst tá tær skulu prógvast, og meira enn nakað, so var tað hetta, sum Tjaldurskvinnurnar prógvaðu í KÍ-høllini.

Tað var tað, sum Guðrun í Lágabø gjørdi, tá liðfelagarnir skinklaðu eitt sindur ta einu løtuna í seinna hálvleiki. Tað var tað, sum Adina Petrea gjørdi, tá hon áhaldandi høgdi tríggjametra-uppstillingarnar í kassan. Tað var eisini tað, sum Annika Thomsen gjørdi í Runavík, tá Alina og Adina vórðu mansvardar í fyrru finaluni. Og tað var eisini tað, sum Elinbjørg Hammer og Marinela Patru gjørdu, tá tær fingu møguleikan at kontra seinastu luftina úr Stjørnuni leygardagin.

Snøgt sagt, so tordi Tjaldur betur at spæla finalurnar. Tær stríddust meira og tær lyftu í felag.

## Útlendingarnir

Sum føroyskur kvinnuhondbóltur hevur ment seg, so er eingin ivi um, at útlendsku spælararnir hava havt sína risastóru ávirkan á, hvar FM-gullið er endað tey nøgvu seinastu árini.

2009 verður einki undantak í so máta, tí tað er eingin ivi um, at uttan útlendska styrkin lá Tjaldur ikki, har tær nú hava reitt sær ból.

Stóri profilurin í ár hevur verið Adina Petrea. Ikki bara takkað verið sínum dygdum, men ikki minst takkað verið hennara drúgvu royndum eisini. Stóran part av árinum hevur tað verið ein vansi, at fysikkurin hevur verið nakað slitin móti dystarenda, men seinastu tveir mánaðirnar hevur hon eisini togað seg upp á tí økinum. Móti Stjørnuni royndist hon enntá eins væl sum Alina í verjupartinum, og tað sigur nú ikki heilt einki. Og fleiri ferðina vóru tað reinir flogbóltsblokkar frá teimum báðum, tá skotroyndirnar frá annars sterku bakketuni hjá Stjørnuni vóru bankaðar út aftur á gólvið.

Og við Marinelu Patru fekk Tjaldur seinasta pettið til puslispælið. Tað merkti, at Adela Burcea í fleiri førum varð sperrað av útlendingakvotuni, men við stórspælinum, sum Guðrun í Lágabø hevur sýnt í málinum, hevur hetta als ikki verið nakar trupulleiki.

## FAKTA um kvinnufinalurnar

**Tjaldur-Stjørnan 25-24 (11-12)**
**10 min:** 4-4
**20 min:** 7-8
**40 min:** 16-16
**50 min:** 21-20
**Málskjúttar**
**Tjaldur:** Alina Olaru Anghel 7(2), Adina Petrea 6(2), Annika Thomsen 5, Jacoba Langgaard 2, Alinbjørg Hammer 2, Marinela Patru 2, Sarah Ann B. Thomsen 1
**Stjørnan:** Durita Christophersen 7, Durita Ljósstein 4(2), Simona Petersen 4, Dianne Møller 4, Joan Midjord Djordjevic 3, Una Olsen 2
**Brotskøst:** Tjaldur 6, Stjørnan 2
**Útvísingar:** Tjaldur 2, Stjørnan 5
**Dómarar:** Sámal Paulason & Kári Hansen

**Stjørnan-Tjaldur 16-25 (8-13)**
**10 min:** 5-5
**20 min:** 7-8
**40 min:** 11-16
**50 min:** 11-18
**Málskjúttar**
**Stjørnan:** Durita Christophersen 4, Simona Petersen 4(1), Una Olsen 4, Edith Hansen 2, Durita Ljósstein 1, Bára S. Klakstein 1
**Tjaldur:** Adina Petrea 9, Jacoba Langgaard 5, Marinela Patru 4, Elinbjørg Hammer 3, Alina Olaru Anghel 3, Annika Thomsen 1
**Brotskøst:** Stjørnan 2
**Útvísingar:** Stjørnan 1, Tjaldur 1
**Dómarar:** Andreas F. Hansen & Eyðun Samuelsen



*Ongan tíð áður hevur Tjadur vunnið nakað sum helst í fremstu hondbóltsrøðini. So løtan var stór hjá bæði spælarum og viðhaldsfólki*